LM-024/2020

Fylgiskjal 3.

FØROYASKÓTARÁÐ

Tórshavn, 9. februar 2020

Til

Fíggjarmálaráðið

Hoyringssvar til

*Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Dagføring av skattafríu upphæddini til sjálvboðið arbeiði innan ítróttarøkið). Mál nr. 19/00428-5*

Føroya Skótaráð, ið er samarbeiði millum samskipanirnar; KFUM skótarnar, KFUK skótarnar og Føroya Skótasamband, hevur fylgjandi viðmerkingar til uppskotið í broyting í løgtingslógini.

1. Tað er at gleðast um, at politiska skipanin raðfestir dygdargott ungdómsarbeiði og skilir tað úrslit, ið spyrst burtur úr hesum arbeiði. Ein av grundarsúlunum undir skótaarbeiðinum er sjálvboðið ólønt arbeiði, ið leiðarar og ungdómsleiðarar leggja eftir seg fyri at menna um tann einstaka og felagskapin. Vit ynskja framhaldandi, at sjálvboðið ólønt arbeiði skal vera bulurin í okkara arbeiði. Til tíðir gerst hettar arbeiði tó so krevjandi, at um vit framhaldandi skulu kunna brúka skikkað fólk til at fyrireika og gjøgnumføra ávísar partar av skótaarbeiðinum, er neyðugt at hesi fáa eina samsýning fyri teirra íkast og mista arbeiðstíð frá øðrum løntum arbeiði.

2. Skótaarbeiðið fevnir um ein stóran part av okkara ungdómi, har vit í serligan mun eru við til at menna tað einstaka menniskja at vera ein góður vinur og ein góður samfelagsborgari. Skótaarbeiðið fevnir eisini um tey, sum ikki eru umfevnd av teimum felagsskapum, ið grunda sítt arbeiði á kappingar. Vit meta, at vit gera ein stóran mun í samfelagnum og at tað, sum verður lagt í ungdómin hjá skótunum, ofta sæst aftur seinri í lívinum hjá teimum, tá tey gerast vaksin. Tað kunnu vit sum borgarar og samfelag vera errin av.

3. Við at hækka stuðulin um skattafría inntøku til limirnar hjá ÍSF, samstundis sum limirnir hjá skótunum framvegis ikki kunnu fáa hendan stuðul, gerðst tað alsamt truplari at fáa skikkað fólk at taka sær av ávísum krevjandi uppgávum í skótaarbeiðinum, og at hendan skeikling kemur at fáa sera stórar avleiðingar fyri eitt framtíðar dygdar arbeiði hjá skótunum og harvið eisini fyri ungdómin í Føroyum.

FØROYASKÓTARÁÐ

4. Seinast lógin var broytt í 2013 gjørdu vit eisini vart við ójavnan, tó uttan at tað fekk nakra ávirkan á lógaruppskotið. Føroya Skótaráð ynskir at lógaruppskotið verður víðkað, so at tað hesaferð eisini umfatar alt ungdómsarbeiði í Føroyum og ikki bert ítróttarfeløgini undir ÍSF.

Við ynski um skilagóða javnseting av dygdargóðum ungdómsarbeiði í Føroyum

Vinarliga

Føroya Skótaráð

Jóna venned, forkvinna